# Millumbylgjan má ikki sløkna aftur

**Ein serstøk Netnevnd hevur gjørt eitt tilmæli um sendinetið hjá bæði Útvarpinum og Sjónvarpinum í framtíðini. Og týdningurin av millumbylgju-sendaranum verður ikki undirmettur**



*Hjørdis Gaard handar Bjarna Djurholm frágreiðingina um sjónvarps- og útvarpsnetið - ein frágreiðing sum er vorðin sera viðkomandi og kærkomin, nú millumbylgjusendarin hevur havt sínar trupulleikar og sendinetið annars hevur fleiri ár á baki*

Mynd: Jens Kr. Vang

SENDINET
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

**Sendinet:** Øll eiga at síggja sjónvarp. Øll eiga at kunna hoyra útvarp í stereo, og tað eigur ikki endurtaka seg, at millumbylgju-sendarin sløknar.

Tað er partur av niðurstøðuni, sum ein serstøk Netnevnd hevur gjørt um sendinetið hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum.

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri setti hesa nevndina niður í 2002, og í gjár kundi nevndin so handa landsstýrismanninum hesa frágreiðingina, har fleiri uppskot og tilráðingar eru til føroyska sendinetið í framtíðini.

Í hesi nevndini hava sitið Hjørdis Gaard fyri Vinnumálaráðið, Jógvan Thomsen og Sigurð Vang frá Fjarskiftiseftirlitinum, Bjarni Wilhelm frá Mentamálaráðnum, Jógvan Jespersen og Hans Andor Johannesen frá Útvarpinum og Carsten M. Arnskov frá Sjónvarpinum.

## Gamlir sendarar

Sendaraútgerðin hjá FM-sendinetinum er longu um átta ára gomul, og er livitíð hennara neyvan longur enn átta ár aftrat, um neyðugt viðlíkahald verður gjørt.

Hinvegin so hava bygningar og mastrar meiri enn 30 ár á baki, og krevja tí stórar umvælingar.

Netnevndin mælir tí til, at gjørd verður ein verkætlan um at útbyggja netið, so tað dekkar í fyrsta lagi øll bústaðarøkini og eisini meginpartin av vegakervinum.

Mælt verður eisini til, at netið verður soleiðis útbygt, at tað ber til at móttaka í stereo við útiantennu í flest øllum støðum, og at øll skulu móttaka í stereo við inniantennu.

- Ein fyribils meting hjá Fjarskiftiseftirlitinum vísir, at tað kostar umleið 1 mió. kr. at dagføra og útbyggja FM-sendinetið, sigur nevndin.

Hinvegin verður víst á, at neyðugt er samstundis at fylgja væl við í gongdini í menningini av digitalum útvarps-sendineti í okkara grannalondum.

## Ikki sløkna aftur

Tá talan er um nógv umtalaðu sendistøðina á millumbylgju hevur henda stóran týdning fyri føroysk sjófólk og lurtarar á landi, sum bara hava hesa støðina at líta á.

Tí er í fyrstu syftu neyðugt at tryggja sær, at hesin sendarin ikki sløknar aftur. Neyðugt er tí við at seta pening av til viðlíkahald.

Henda sendistøðin varð bygd til at røkka nærleiðirnar, men tað hevur víst seg, at hon við skiftandi góðsku hoyrist undir Íslandi, í Irmingarhavinum, Norðhavinum, Írska havinum og í Norðsjónum.

Sendistøðin hoyrist rímiligt ella illa í Eysturgrønlandi, við Bjarnoynna, Svalbard og har eysturi í Barentshavinum, men á Flemish Cap hoyrist hon als ikki.

Mælt verður til at gera eina óhefta meting av sendistøðini, og ein spurningur í hesum sambandi er, um ein ikki eigur at digitalisera støðina.

## Fimm SV-rásir

Tá talan er um sjónvarpssendinetið so dekkar tað ikki øll búsett øki í Føroyum. Men nevndin er samd um, at sjónvarpssendinetið eigur at dekka øll búsett øki í landinum.

Hinvegin so er spurningurin um sendinetið ikki avgreiddur. Umboðini fyri Mentamálaráðið, Útvarpið og Sjónvarpið mæla tó til, at landið skal hava ræðisrætt yvir einum almennum og digitalum sendineti.

Kannast skal eisini um Televarpið er áhugað fyri einum samstarvi við tað almenna um eitt framtíðar digitalt sendinet.

Longu fyri hálvum árum síðani mælti Sjónvarpið til at virksemið hjá stovninum eigur eisini at fevna um at endurvarpa Public Service rásir úr grannalondunum, umframt ta føroysku framleiðsluna. Hetta hevur so aftur við sær, at tørvur verður á fleiri rásum – helst eini fimm í tali.

Ein fyribils kostnaðarmeting vísir, at eitt tílíkt sendinet kostar einar 25 mió. kr. at byggja.


ydes gulve

Gulvmontører til Danmark

Til dansk gulvfirma søges 2 top-professionelle gulvmontører til montering af gulve i træ, linoleum, vinyl samt vådrum og tæpper.


René

Vi er et kreativt team, som har mange spændende specialopgaver for vore kunder, som er vant til en høflig og omgængelig adfærd samt et flot professionelt resultat.

Har du mod på et spændende job i Danmark og mener at du kan leve op til en god løn - så vil vi gerne høre fra dig.

Ring til René på +45 75 91 48 00
eller mail til
yde@ydesgulve.dk

**PS**: Vi har i øvrigt en Færing ansat, som har været hos os i 2 år.

Vejlevej 71 • DK-7000 Fredericia • Tlf. +45 75 91 48 00



UNDANFØRLEIKI

## Hovstunnilin - freistin er longd

**Útbjóðandi myndugleiki**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
Heimasíða: www.landsverk.fo
T-post: lv@lv.fo

Landsverk er ein almennur stovnur undir Vinnumálaráðnum. Sum byggiharri tekur Landsverk sær av almennum byggiuppgávum.

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Arbeiðstøkan verður útboðin í innbodnari høvðusarbeiðstøku við undanførleika. Útbjóðandi myndugleikin ætlar at heita á 5-7 tilboðsveitarar um at geva tilboð.

**Lýsing**
Høvuðsarbeiðstøkan umfatar øll arbeiði í sambandi við gerð av tunnilssambandi millum Øravík og Hov. Undir hesum hoyrir: 2445 m sprongdur tunnil, klassi T9,5, 3215 m atkomuvegir, 4 vegarbrýr, innleggingar og trygdarútgerð.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til:
Landsverk
Postboks 78
FO-100 Tórshavn

Umbønin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 19. apríl 2005

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum í mai 2005.

**Rættarligur formur í sambandi við samtøk**
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapum skulu, áðrenn sáttmálabýting við útbjóðandi myndugleikan, geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrging fyri sáttmálanum. Felagsskapir ella líknandi skulu haraftrat frammanundan útnevna ein umboðsmann við skjal-próvaðari umboðsfulltrú til, vegna felagsskapin, at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til undanførleika**
Umsøkjararar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesa upplýsingar:

Upplýsingar um egnu viðurskifti arbeiðstakarans og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikakrøvini til metingar av tí kravdu minstuorkuni av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slag.

Upplýsingar um fyriskipanina hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.

Váttan ella trúnaðarváttan um í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.

Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við einari váttan av samlaða umsetninginum í miðal hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.

Eina váttan um árliga miðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.

Ummæli frá samsvarandi uppgávum.

Lívsgongdarlýsing (CV) hjá nøkrum lyklafólkum, ið verða sett á uppgávuna.

Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land